


*Red Rubber (reytt gummi) var tann kendasta bókin, sum Morel skrivaði um viðurskiftini í Congo. Hon er prentað í fleiri útgávum og finst eisini á norskum. Hetta er forsíðan á fyrstu útgávuni, har Leopold kongur verður vigaður á dómadegi og verður funnin ov lættur. Avhøgda hondin á vektini fellur dómin hjá eftirtíðini yvir hetta stýri. Fleiri av myndunum í hesi greinarøð er úr hesi bók*




*Hetta er ein lýsing fyri blaðið "The West African Mail", har greinirnar hjá Daniel J. Danielsen vóru prentaðar. Hetta blað viðgjørdi eisini viðurskiftini í øðrum vestuafrikanskum londum. Blaðið kom út eina ferð um vikuna, og síðutalið fyri árið lá um 1.000. Hetta var umframt alt annað, sum Morel fekk av skafti*

tikið er til í dag.

Beint nú eru varrarnar á teimum, sum hava sæð hesi viðurskifti læstar, men ein eingilskmaður (hetta kann bert vera D. J. Danielsen), sum hevur verið við Casement á øllum túrinum dregur soleiðis saman um:

"Tað er tað mest ræðuliga trælahald, sum gongur fyri seg á hesum leiðum. Fólk verða mishandlað av myndugleikunum, og um einki verður gjørt skjótt, so verður tað ov seint."

Frágreiðingin hjá Casment verður skjótt handað stjórnini, og tað verður ikki leingi, til innihaldið í henni verður tøkt.

**Viðmerking**

Henda grein er skrivað beint áðrenn Casement kemur til Bretlands. Keldan kann tí bert vera Dollin.

## Dollin skrivar til Morel

**Hesa tíðina býr Dollin í Burnbank Gardens í Glasgow. Hann skrivar 4. Desember 1903 soljóðandi bræv til Morel:**

Góði Sir,
Eg havi beint fingið eitt bræv frá Mr. Casement. Hann heldur at tað er best, at mín bústaður ikki enn verður nevndur í samband við hesa ferðina í juli, august og september. Hetta má bíða inntil stjórnin hevur tikið stig í hesum máli.

So um tygum almannakunngera nakað av hesum tilfari, tak so burtur úr brotini, sum snúgva seg um sjálvan túrin. Consulin (Casement) sigur mær, at hann er fegin um at síggja Congogreinina í tygara blaði í seinastu viku. (Tað er helst greinin frá 1.12 1903.) Eg haldi, at vit hava fingið tikið Congotarvin við hornini hesa ferð.

Eg skal tosa í Edinburgh í Carubbers Close Mission tann 19. og í Synod Hall 20. hendan mánaðin. Eg fari eisini at vísa myndir av dreingjum við hondunum høgdum av.

Eg væntaði at frætta tíðindi úr Congo í seinasta posti, men einki var. Tað tykist, sum at menn eru ræddir fyri avleiðingunum, um teir siga sannleikan.

Eg hugsi, at vit trúboðarar kunnu gera lítið í sjálvum Congo, fyrr enn hetta trælahald er avtikið.

Vinarliga
D. J. Danielsen

**Viðmerking**

Tað áhugaverda við hesum brævi er, at tað sæst, at Casement hevur sett seg í samband við Dollan beinanvegin, hann er komin heim úr Congo. Casement er komin tann 1. desember, og longu tann 4. skrivar Dollin til Morel, at hann hevur fingið bræv frá Casement. Samstundis merkist, at hann følir seg ikki heilt tryggan, tí skal bústaðurin ikki nevnast.

Her skal eisini greiðast eitt sindur frá Carubbers Close, har Daniel sigur í brævinum, at hann eisini skal tala.

Hetta er ein kristilig samkoma. Sum greitt varð frá í 1. parti, var tað uttan iva her, at hann hitti Linu, sum hann giftist við eitt hálvt ár seinni.

Carubbers Close var stovnað í 1858. Navnið man vísa til gøtuna, har samkoman upprunaliga helt til. Í 1883 kemur kendi evangelisturin D. L. Moody til Edinburgh. Hann sær tørvin á einum nýggjum samkomuhúsi og fær reist neyðugan pening til at byggja ein nýggjan sal. Hann legði eisini grundarsteinin til salin, sum enn er í High Street, ikki langt frá Princes Street.

Í 1990 er salurin fullkomiliga umbygdur. Her eru pláss fyri 300 fólkum, og tey eru 2-300, sum framvegis koma higar. Tann sum hevur hug at vita meira kann fara inn á heimasíðuna:
www.carrubbers.org

Her kann skoytast uppí, at Synod Hall, har Dollin helt sínar stóru fundir er ikki til longur.

## Lagdur undir morð

**Morel skrivar 4. des. 1903.**

Góði Mr. Danielson
Eg takki fyri tygara bræv við útklippum, sum eg skal gera ein samandrátt burtur úr. Eg ynski, at tygum geva mær adressur hjá nøkrum fólkum har norðuri (í Bretlandi), sum tygum siga eru áhugað fyri Congomálinum. Eg vil tá senda teimum eintak av blaðnum, so tey kunnu gerast haldarar.

Eg havi ikki hoyrt nakað um eitt morðmál, sum tygum siga at staturin roynir at hanga uppí tygum.

**Viðmerking**

Hetta morðmálið hava vit ikki sæð nevnt aðra staðni. Men hetta hevur so verið ein partur av tí, sum Dollin hevur verið útsettur fyri. Hetta kann hava samband við málið, sum varð umrøtt í seimasta parti, har Dollin verður lagdur undir at fara illa við teimum innføddu.

## Gummiræðið

**Tann 11. desember 1903 er aftur grein í West African Mail:**

Harra D. J. Danielsen, hvørs røðu í Edinburgh vit fyri kortum hava endurgivið, hevði í seinastu viku eina samrøðu við umboð fyri blaðið Daily Record and Mail í Glasgow, og her segði hann:

Tað er einki løgið í, segði harra Danielson, at trýstið á fólkið setur tað upp í móti statinum. Tað er gummimálið, sum er orsøkin til allar hesar trupulleikar. Eg eigi myndir av fólki, sum er lamløstað, og hvørs hendur eru kvettar av sum ávaring til onnur, sum ikki gera eitt nøktandi arbeiði fyri gummiagentarnar. Foreldrini hjá einum lamløstaðum innføddum mótmæltu hjá eini gummifyritøku, og tey fingu at vita, at um tey innføddu ikki arbeiddu betri, so vildi hetta verða gjørt aftur.

At taka kvinnur sum gíðslar er dagligur kostur, og tær verða bert settar leysar aftur, tá ið teirra menn ella vinir koma við teirri nøgd av gummi, sum kravd er av umboðsmonnum hjá fyritøkuni. Henda framferðin verður søgd at vera enn verri, enn hon, sum var nýtt av arabisku trælahandilsmonnunum, sum nú er hildin uppat. Og Leopold kongur boðaði enntá frá fyri 18 árum síðani, tá ið hann fekk ræði á Congo, sínum europeisku sameindu frá, at einasta mál hansara var at endurreisa moral og liviumstøður hjá fólkinum.

Spurningurin er, segði trúboðarin, hvussu hann hevur hildið síni lyfti.

Sum svar uppá fyrispurningum frá okkara blaðmanni, legði harra Danielson stóran dent á, at um hetta trælahald ikki verður steðgað, vil tíðin koma, tá fólkið í Frístatinum Congo verður fullkomiliga útruddað.

Á summum plássum, helt hann áfram, er hurðin afturlatin fyri trúboðarum. Men ein av treytunum, Leopold fekk fyri at fáa ræðið á Congo, var, at allir trúboðarar hjá øllum trúarbólkum skuldu hava frítt at prædika og ferðast í landinum. Nógva staðni í landinum hava eisini verið stig tikin til at forða innføddum at selja matvørur til trúboðarar, uttan at fyrst at hava fingið loyvi frá gummimonopolistum.